DAGSINS MEINING

Ábyrgdarloysi

Tað er vorðin gerandiskostur hjá løgmanni og varaløgmanni at fara út í fjølmiðlarnar við sera hvassorðaðum orðingum og atfinningum móti hvørjum øðrum. Orð sum ábyrgdarloysi eru afturvendandi.

Fyri Føroya fólk er slíkt óhaldbart. Hóast val er um tríggjar mánaðir, so kunnu hvørki løgmaður ella varaløgmaður bjóða Føroya fólki hetta. At samgonguflokkar kunnu vera ósamdir er so eitt, men at teir nærum bevíst og tilætlað fara út í fjølmiðlarnar við úttalilsum, sum grava djúpri og dúpri kluft millum teirra er ábyrgarleyst fyri at brúka teirra egnu orð. Vit siga ikki løgmann ringan fyri at havast at varaløgmanni og fíggjarmálaráðharranum, ið misbrúka teirra støðu í landsstýrinum við útspælum, ið eru rein tjóðveldispropaganda. At tosa um fólkaatkvøðu í komandi valskeiði um fullveldi er jú beint í andsøgn við tað samgongan hevur samtykt. Men tað er ábyrgdarleyst av løgmanni at lata alt um seg ganga. Hann hevur áður megnað at sett landsstýrisfólk, sum ikki hava fylgt spæireglunum, uppá pláss. Spurningurin er hví hann ikki gevur Tjóðveldisfólkunum greið boð: antin halda tey seg til tær samtyktir landsstýrið hevur gjørt ella finna tey hurðina! At vísa til at komandi val er beint fyri stavn er ikki nóg góð grundgeving. Tað er ábyrgdarleyst at hava eitt landsstýri sitandi hesa tíðina, sum bara fer at reka partapolitikk og føra valstríð. Tá varð meira ærligt at upployst samgonguna og skrivað út nýval. Í hvussu er átti løgmaður at tikið áheitanina frá Javnaðarflokkinum um frá nú av at virka sum eitt umsitingarstýrið til eftirtektar.

Tað er eisini ábyrgdarleyst av Tjóðveldisflokkinum at tvíhalda um landsstýrissessir sínar, tá flokkurin heldur løgmann vera so langt úti og flokkurin als ikki tykist at vera á somu kós í fullveldismálinum sum løgmaður. Um Tjóðveldisflokkurin meinar tað hann sigur um fólkaatkvøðu í næsta skeiði ol. og hetta er heilt uppá tvørs av tí, sum løgmaður metir teir eru samdir um, hví tekur Tjóðveldisflokkurin tá ikki seg úr samgonguni! So kann hann føra sítt fullveldisstríð móti løgmanni og Fólkaflokki í andstøðu. Hevði tað ikki verið meira reiðiligt og ærligt. Í staðin fyri sum nú at niðurgera tann týðandi politiska pall, sum Tinganes er.

Okkara ráð eru tí: antin útskrivar løgmaður val nú ella hann vísir Tjóðveldisflokkinum hurðina ella takkar Tjóðveldisflokkurin fyri seg í Tinganesi og fer í andstøðu.

Onkur heldur, at henda innanhýsis orrusta millum løgmann og varaløgmann eru avtalað spæl – soleiðis at báðir teirra kunnu føra sítt valstríð og harvið verða teir, sum seta dagsskránna. Tvs. at teir hava um somu tíð leiklutin sum landsstýri og andstøða. Hetta loyva vit okkum at ivast í. Tí veljarin er ikki býttur. Heldur hetta klandurið fram ótarnað, so missir veljarin rætt og slætt álitið til teir báðar flokkarnar. Og hvat hava teir tá vunnið.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Æran, undirsjóvartunnilin og kattakórið

Jens Eli Ellefsen

Las lesarabrøv, har hygdarmaður mín Ivan Johannesen svarar einum lesarabrævið frá Jørgen Niclasen, sum eg hevði lisið frammanundan. Lat meg fyrst siga, at tað hjá Jørgeni var bæði upplýsandi og undirhaldandi, og har kundi eg staðfesta bæði raðfylgju og sannleikan, sum var farin fram. Vit eru nøkur, sum veruliga hava fylgt við. Eg las eisini svarið, sum Ivan Johannesen so jonkasliga kom við, har hann royndi at skava útyvir veruleikan.

Mong munnu minnast ein politiskan pallborðsfund á Giljanesi mitt í nítiárunum. Serliga tá Ivan tók orðið og fór at reypa sær av, at tað var hann sum fíggjarmálaráðharri í 1989, sum hevði steðga undirsjóvartunnlinum undir Vestmannasundi. Grundin skuldi verða ov lítið av pengum. Vit vóru yvir 100 fólk sum vitni, og øll sótu vit sum kánus. Fyri tað fyrsta hevði landsstýrið brúkt pening til alt møguligt annað fjas hesi árini, so hví júst steðga undirsjóvartunnlinum og serliga undraðust vit á hví Ivan reypaði sær av at hava steðga arbeiðinum.

Vit kunnu tó nú glaðast, tí tunnilin er skotin íggjognum, tó 10 ár seinkaður. Ímyndi tykkum hvønn týðning hetta kundi havt fyri oynna í framburði hesi 10 árini, um tunnilin ikki var steðgaður í 1989 (súrsokkar!!).

Við Henry á Fútaklett

Meðan eg siti og lesi, rennur mær til hugs hvussu broytingar eru hendar. Eg minnist sum smádrongur, tá vit um summranar fóru at vitja ommu og abba í Rituvík. Tað var ein lang ferð. Um 9-tíðina á morgni við Henry á Fútaklett og so við sluppunganum Ólavi um sundið til Vestmannar. So við bili til Kollafirðar har mjólkarbáturin førdi okkum til Havnar. Tá var seint og longur slappst ikki tann dagin, so vit máttu sova á Sjómansheiminum. Næsta dag um middagsleitið førdi Mjólkarforsýningin okkum inn á Toftir, og harfrá við taxa yvir um hálsin til Rituvíkar. Tá nærkaðist skýming næsta ferðardagin, so tit kunnu ætla, at tað ikki var á hvørjum summri at mamma og pápi tóku barnaflokkin upp á 8 á so langa ferð.

Men seinni minnist eg at broytingar komu. Vesturleið stytti nógv um túrin til Havnar, hóast Vágafjørður ikki altid var so tespiligur. Síðan fór Bragd at sigla um Vestmannasund, og hann var avloystur av gamla Sam. Fyri ikki at tala um tá koyrandi var allan vegin til Havnar og nýggi Sam kom.

Brúgv í 30-unum

Fasta sambandið um Vestmannasund er tó ein gamal dreymur. Fyrstur við hugskotinum var Sámal Ellefsen, sum var valdur á ting fyri Vinnuflokkin (seinni Fólkaflokkurin). Síðst í 30-unum kom hann úr Canada, og tá vildi hann hava brúgv bygda um sundi. Tá Canadiumenn kundu byggja brúgvar, so kundu vit eisini, segði hann.

Hvør minnist ikki tá Vilhelm Nielsen, Haldur Hansen og Leon Joensen í sjeytiárunum stríddust fyri heingibrúgv. Einki nyttaði, tí mótstøðan úr Havn var so stór.

Felagkommunan í Vágum

Kommunurnar í oynni fóru so sjálvar ígongd og gjørdu eitt kempiarbeiði og løgdu tá støði undir tað sum í dag er veruleiki. Landsstýrið steðgaði kommunum, tí hetta skuldi ikki gerast av kommunum. Landsstýrið setti á at gera klárt, men alt ímóti fasta sambandinum. Man slapp ikki at keypa eitt rugbryeð frá Restorff´sbakarí uttan at skriva undir. Aage-bróður noktaði at taka ímóti undirskrifunum og Havnin rópti hann út til ársins ulku.

Tí var tað stuttligt at síggja, tá nú veitslan var hetta kvøldið, her niðan fyri vegin í bygdarhúsinum í Miðvági. Síðsta skotið í tunnlinum var skotið. Ulkan var ikki boðin við, men fleiri av ulkupillunum, sum høvdu skrivað undir mótmælini sótu til háborðs og sjungaðu. Nótin var toliligur á teimum fyrstu ørindunum, men móti endanum minti tað mest um eitt kattakór. Var ein loynilig kontakt uttan á bygdarhúsinum, hevði man snýkt seg oman at sløkt sangin.

Fólkaflokkurin eigur framburðin

Nú vit minnast, má eg ásanna, at tey seinastu 4 árini fara at seta seg í minnið, sum tað valskeiðið, har stórstu framburðarmøguleikarnir eru hendir fyri Vágoynna. Tað kunnu ikki verða tvær meiningar um tað. Íggjognum allar tíðir hevur Fólkaflokkurin gjørt eitt megnar arbeiðið fyri oynna, ikki minst í hesum valskeiðnum.

Viðmerkingar til Fróðskaparsetrið

Finnur Helmsdal
tingmaður

Av tí at leiðslan á Fróðskaparsetrinum í tíðindaskrivi týsdagin 5. februar roynir at sáa iva í almenninginum um mítt arbeiði sum tingmaður, og tá sama leiðsla ger brot á vanliga mannagongd við at viðgera fyrispurningar til landsstýrismannin alment, loyvi eg mær at koma við hesum viðmerkingum:

Almenn viðurskifti, sum fáa rættiliga óhepna umrøðu, hevur tingmaður bæði rætt og skyldu til at royna at fáa fram í ljósmála.

Líka mikið, hvussu leikur fer, eigur Fróðskaparsetrið at vera ein týðandi nerv í føroyska samfelagnum í allari framtíð. Tí eigur setrið eisini at virka sum fólksins stovnur við tí opinleika, sum hetta krevur.

Tað skal tí vera mín vón, at leiðslan á Fróðskaparsetrinum fer at vívirka opið og ærliga soleiðis, at landsstýrismaðurin verður førur fyri at vara tingi og Føroya fólki nøktandi upp á spurningarnar, sum settir eru fram í hesum sambandi.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Als onki við "anti" at gera

uttan kanska "antisosialistiskt"

Jógvan við Keldu
løgtingsmaður Fólkafloksins í Norðoyggjum
Teldupostur:
keldu@post.olivant.fo
Heimasíða:
www. get.to/keldu

At eg haldi fast við avgerðirnar hjá samgonguni fær Annitu á Fríðriksmørk úr Tjóðveldisflokkinum at ilskast. Hon fýrir ikki fyri at skíra samgongufólk, sum vísa til júst gjørdar avtalur, fyri "antisuðurstreymsk".

Eg haldi ikki, at nøkur orsøk er til, at vit bæði úr somu samgongu fara at munnhøggast um barnaansingarmál. Grundarlagið undir hesum máli er lagt av samgonguni. Her eru greiðar linjur, sum samgongan hevur stungið út í kortið, enntá saman við føroysku kommununum.

Orsøkin til at Annita reisir uggafjarðarnar man helst vera, at hon ikki fær øll samgongufólk at fylgja nýggju sentralistisk/sosialistisku kósini, sum flokkur hennara nú tykist hava lagt.

Fyri ikki at leingja óneyðugt um hetta orðaskifti, fari eg tí bert at seta Annitu nakrar spurningar: Hevur landsstýrið ikki á ávísum økjum gjørt greitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur?

Hevur Tjóðveldisflokkurin ikki júst verið við til at samtykkja, at barnaansing er rein kommunal ábyrgd?

Er Tórshavnar Kommuna ikki nógv tann ríkasta kommunan í landinum – við einari miðal inntøku um 20% hægri enn hjá øðrum stórum kommunum – av almennum peningi?

Hevur Tórshavnar Kommuna ikki eitt lægri skattaprosent enn flestu stóru og miðalstóru kommunur í landinum, mest orsakað av almennum stovnum?

Er tað ikki rætt, at Tórshavnar Kommuna fær umleið eins nógv í skattainntøku frá Landssjúkrahúsinum einsamallum, sum t.d. Tvøroyrar Kommuna fær í alt – góðar 40 milliónir krónur?

Eru trupulleikarnir úti um landið, ikki eins stórir ella størri – lutvíst – sum í Havn, tá tað snýr seg um at fáa læknar, fakfólk og sjúkrahúslæknar til hini bæði sjúkrahúsini?

Er ikki væntandi, at líknandi ynski fara at koma frá almennum stovnum um alt landið sum í Havn?

Er tað ti rímiligt, at borgarar úr kommunum við væl lægri miðalinntøku, sum flestar eru vunnar av privatum fyritakssemi, og sjálvsagt tí við hægri skattaprosenti, fyri so dánt at kunna svara ábyrgdir, skulu gjalda fyri ábyrgdir hjá Tórshavnar Kommunu?

Angrar Tjóðveldisflokkurin gjørdar avtalur og vil sleppa aftur til gomlu skipanina? - Ella er hugurin kanska betri til at fara fram "sum best ber til"?

Vónandi fer Annita á Fríðriksmørk stutt og greitt at svara mær hesum einfaldu og eyðmjúku spurningunum.

Færøbanksagen annar partur

Kaj Leo Johannesen

Havið við áhuga lisið greinina hjá Landsstýrismanninum í Sjávarstýrismálum við yvirskriftini **"Vanligi Føroyingurin hevur goldið fyri kreppuna"**, har gevi eg honum rætt, havi stóra virðing fyri manninum, og øllum øðrum, sum arbeiða so hart, fyri tí, sum tey halda verða rætt, so er tað sagt.

Landstýrismaðurin sigur at Richard Mikkelsen hevur elvt til ávíst nýtt kjak við síni bók um bankamálið at ja "sjálvt menn sum ikki hava lisið bókina, eru farnir at skriva lesarabrøv um hana" eg haldi at tú meinar við undirritaða, um ikki, so fari, eg at gerða nakrar viðmerkingar kortini.

Tá eg lesið greinina, veit eg at vit ikki hava somu áskoðan um Bankamálið, sjálvt um eg ikki yvist í, at tann søguliga gongdin er rætt, men eg meti ikki at niðurstøðurnar og alternativini, til at yvirtaka bankan eru so líkatil, sum sagt verður, vit kunnu ongantíð siga nú, hvat hevði verði betri at gjørt, eftirsum tað ongantíð hevur staðið sína roynd.

Í Keypmannahavn sat ein Føroya bólkur, sum legði allan kreppupolitikkin til rættis, áðrenn bankakreppan fór á rull, soleiðis sum Landstýrismaðurin skrivar, so siti eg eftir við kensluni av at tað var Føroya bólkurin sum legði kreppuna til rættis, áðrenn teir koyrdu bankan á heysin, hettar er sjálvandi búra skeivt.

Bankakreppan var sjósett, áðrenn nakar Føroya bólkur nakrantið sá dagsins ljós, og vóru tað vit sjálvi sum skaptu kreppuna, og tað eru vit sjálvi sum skulu taka ábyrgdina.

Síðani verður nevnt at um ikki Føroyski skattgjaldarinrindaði 2,7 milliardir so fór samfelagið á heysin, og fólk mistu hús og heim, soleiðis setur Richard Mikkelsen eisini støðuna upp.

Síðani sigur Landsstýrismaðurin at, tað vóru nógvir møguleikar at bjarga tí, sum kundi bjargast, og tað kundi verði gjørt nógv bíligari.

Hvussu kunnu vit vita tað, tá tann loysnin ikki var gjøgnumført ????

Føroya bólkurin viðgjørdi longu í Sep 92 fleiri møguleikar at bjarga og sanera Føroyska bankakervið.

1. Tað bar til at stovna nýggjan Banka, har tey góðu lánini vóru, meðan tey ringu lánini fóru í eitt avtøkufelag.
2. Tað bar til at taka tey ringu lánini úr bankanum yvir í eitt avtøkufelag, og so lata Sjóvinnubankan halda fram
3. Lata størstu innskjótarnir umleggja nakað av sínum til partapening

Í tí støðuni sum Føroyar vóru komnar í var ikki talan um at taka tey ringu lánini úr bankanum, tað vildi sjálvandi verði nógv skjótari, at tikið tey fáu góðu lánini úr bankanum, men skal eitt lán ella fordring keypast, so skal finnast keypari, men undir táverandi umstøðum var hann ringur at finna.

Tað at leggja upp til, at størstu innskjótarnir umleggja nakað av sínum partapeningi, hvør hevði nokk av peningi, og hvør hevði sett pening í so stórt trotabúgv ???

Men víðari sigur landsstýrismaðurin at tað bar eisin til at lata Landskassanum alla rokningina, tað var nógv tann dýrasta loysnin fyri landið, men við hesum kundi Føroyar setast undir umsiting.

"Skeivt " loysnin hevur víst seg aftaná at verði nógv tann besti handilin sum Føroyingar nakrantíð hava gjørt.

Lat meg siga tað í einari aðrari samanbering, eg eri ómetaliga glaður fyri at okkara skuld ikki var til eitt nú Japan, so kundu vit skjótt verðuliga sæð, hvat tað var at verða settur undir umsiting, men hetta er bara mín hugsan, av góðum grundum veit eg ikki um tað er verðuleikin, eftirum vit ikki høvdu lán í Japan sum ikki vóru afturgoldin.

Føroyar vóru í veruleikanum settar undir umsiting langt áðrenn, av okkara egnu politikkarum.

Tá tað so verður sagt at tað er vanliga Føroyinginum fyri at takka at vit eru um at koma burturúr kreppuni, so vil eg fyrst og fremst takkað Gudi fyri at hann hevur givið okkum fisk í rikiligt mát á grunnarnir aftur, og sjálvandi eiga vit øll stóran leiklut í uppgongdini, og er tað nettup tí at eg meti at vit kunnu ikki bara taka ábyrgd, tá tað gongur rætta vegin, men mugu eisini taka ábyrgd tá Føroyar fóru á húsagang.

Og tá so landsstýrismaðurin sigur at tað ongantíð má henda aftur at vit skulu tosa um leiklutin hjá einum Donskum embætismanni í okkara egna fólkaræði, er tað er rætt.

Vit mugu heldur ongantíð sleppa okkara egnu politikkarum aftur, at svansa við virðunum hjá øllum Føroyingum, soleiðis at fólkaræði verður sett til viks.

Tá tað so verður sagt at vit høvdu einki val, men fingu bæði pest og kolera, so má onkur geva mær rætt, at ongantíð hevur tað hent áður, at ein sjúklingur sum hevði bæði pest og kolera, er komin so skjótt fyri seg aftur, sum Føroyar.

Eg eri enn ikki byrjaður uppá bókina hjá Richard Mikkelsen, men eg vil kortini biðja Landstýrismannin halda mær tilgóðar, at eg skrivi lesarabrøv í samband við bókina, og ynskja honum alt tað besta framyvir.

Føroyingar og heilsutrupulleikar v.m.!

Hans Birgir Hansen

Eg havi áður alment mótalt arvagransking í Føroyum. Arvagransking og granskingarstovnar eru fullkomuliga óneyðug, tá tað finnast alternativir viðgerðarháttir her á landi. Eg kann vísa á búskapar- og samfelagsligan týdning við at broyta lívs-, kost- og nýtsluvanar, hjá øllum bólkum av føroyingum, ið hava heilsutrupulleikar v.m.. Tað finst náttúruheilivágur á danska og føroyska heimamarknaðinum, ið kann lekja føroyingar fyri allar deyðiligar sjúkur/fylgisjúkur. Náttúruheilivágur, ið ein kann fáa fatur á. Tað er við hjálp av náttúruheilivági og náttúruúrdráttum, at ein vann sær heilsu og økta vælveru aftur, og nú skal ein útbyggja sær góða heilsu.

Tað er ein hópur av føroyingum, sum vóru uppgivir av læknum, ið hava vunnið sær heilsuna aftur við hjálp av áður nevnda. Hví ikki fáa roynt slíkt í dag? Eg havi áhuga í taka hendan táttin upp aftur í bløðunum, og vil eg heita á allar lesarar um at geva sær neyðuga tíð at lesa heilsu/læknateigar. Tað hevur avgerðandi týðning at kunna seg um, umveg til sjúku og lívið, ið ein kann vísa tykkum á, úti á upplýsandi heimasíðu á internetinum.

Tað skal vera alment funnist harðliga at øllum, ið leggja fót fyri, at føroyingar vinna sær heilsuna aftur, hvat allir lækna-autoritetir gera í dag!

Tað er stórur munur á heilivágsfyritøkum og teimum við náttúruheilivági og -úrdráttum, ið eru úti á tí føroyska heimamarknaðinum. Tað hevði verið gott um lesarar, ið kenna fólk við heilsutrupulleikum v.m., gjørdu vart við seg.

PS: Vitja heimasíðuna www.faroeinn.fo

Til Jørgen Niclassen, landsstýrismann

Viðvíkjandi gýtingarøkinum í Vága- og Sandshavinum

Undirritaðu tingmenn vilja við hesum heita á landsstýrismannin um at taka til umhugsunnar at økja um friðaða gýtingarøkið vestanfyri.

Nú fiskurin kemur inn á grunnarnar at gýta, so verður nú eins og undanfarin ár nógv tosað um, at fiskurin ikki fær frið á gýtingarøkinum, og tá serliga í Vágs og Sandshavinum.

Hetta kemur av, at tað friðaða økið ikki dekkar alt gýtingarøkið ella várleiðina.

Undanfarin ár hevur verið stríð ímillum veiðuhættir eins og stríð hevur verið ímillum skipabólkar á nevnda øki.

Tí verður við hesum landsstýrismaðurin biðin um at umhugsa, um ikki nevnda økið átti at verið víðkað soleiðis, at allur várgrunnurin kemur undir friðaða økið.

Á løgtingi 31.01.2002

Eyðun Viderø, løgtingsmaður

Jóanis Nielsen, løgtingsmaður

At svølgja kamelar

Heini Olsen

Nú eru skjótt nógv ár síðan ein vælkendur norðoyingur segði: "Í okkara flokki hava vit ikki brúk fyri vingulskóltum..."

So er spurningurin bara um Javnaðarflokkurin hevur pláss fyri opportunistum. Gott nokk eru politikkur og opportunisma mest sum systkinabørn, men fyri tað er ongin orsøk at leypa á leistum.

Man har et standpunkt.... Erlig talt!!